# Ferðavinnan í nótakasti



*Dánjal Poulsen, stjóri á Faroe Travel, óttast ikki fyri, at eitt nú »Netbooking« og aðrar tænastur á alnótini fara at hótta ferðaskrivstovurnar*

**Ferðavinnan brúkar í stóran mun teir mongu møguleikar, sum liggja á alnótini. Umframt flogfeløgini hava eisini ferðaskrivstovurnar møguleika fyri at leggja sínar tænastu á alnótina. Ein teirra er Faroe Travel í Havn, har tey ikki kenna seg hótt av »Netbooking«**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Faroe Travel fer at leggja ymsar tænastur á alnótina til sonevnt »Netbooking«. Heldur enn at ræðast, at flogfeløgini brúka hesa tænastu, fer ferðaskrivstovan sjálv at bjóða hana út.

Dánjal Poulsen, stjóri á Faroe Travel, sigur, at enn er ætlanin so stutt komin, at hann einki ítøkiligt leggur í at siga um sjálva tænastuna, tey fara at bjóða út. Uttan tað, at tey fara helst at hava fleiri av teirra vørum til taks á alnótini, soleiðis at fólk sjálv kunnu sita og leggja sær sínar ferðir til rættis heima við hús.

Men tað verður tó helst ikki so at fólk kunnu keypa ta endaligu vøuna, sigur hann, uttan bara bíleggja hjá teimum, sum so avgreiða tað seinasta á skrivstovuni.

Dánjal Poulsen óttast ikki fyri, at tænastur sum »Netbooking« hjá flogfeløgunum fara at taka nakað av týdningi frá ferðaskrivstovunum, sum annars plaga at selja flogferðaseðlar.

– Taka vit eitt nú Atlantsflog, sigur hann, so selur felagið bara ferðaseðlar til sínar egnu rutur á alnótini. Tað er tað einfaldasta, sum tú sjálvur kanst avgreiða har. Ein ferðaseðil frá A til B og heim aftur til A. Skal fólk hinvegin ferðast um hálvan ella heilan knøttin, verður neyðugt við eini feðraskrivstovu, sum kann leggja fleiri rutur saman og fáa flutt fólk og viðføri samanhangandi úr Vágum til Hong Kong. Tað skulu ofta fleiri enn eitt og tvey flogfeløg til, vísir hann á, og tá kann ein heimatelda líkasum ikki kappast við tann roynda ferðaseðlaseljaran á ferðaskrivstovuni.

Eitt annað, sum ivaleyst heldur rættiliga fitt av fólki aftur í at keypa á alnótini er hetta, at ein skal skráseta sítt kreditkort tá keypt verður.

– Har er skjótt at koma skeivt fyri, vísir Dánjal Poulsen á. Er kortið skrásett, renna penganir út, og tú hevur ikki altíð so øgiliga góðan møguleika at koma aftur umaftur, um tú hevur trýst á ein skeivan knøtt og ikki gerst varugur við tað, fyrr enn ov seint er.

Tann skipanin, sum Faroe Travel hevur undir uppsigling, skal væntandi ikki gerast ein slík, sigur Dánjal Poulsen. Hon skal vera bíleggingarskipan, har fólk kunnu biða um ferðirnar, og síðan koma á skrivstovuna at avgreiða endaliga úrslitið. Gjalda og heinta ferðaseðlarnar.

Hóast »Netbooking« er heilt vanligt, er tað ikki nakað, sum hóttir ferðaskrivstovurnar, heldur Dánjal Poulsen.

– Taka vit eitt nú ferðir til Australia, so eru rættiliga nógv tilboð og líka nógvir ymiskir prísir at kanna. Tað er ofta meira, enn privatfólk, sum ikki hava dagligu royndirnar, klára at finna útav, sigur hann.

So alt í alt er hann ikki ræddur fyri, at alnótin við øllum sínum møguleikum fer at forkoma ferðaskrivstovunum, sum vit kenna í dag, hóast broytingar uttan iva fara at koma.




✝

Kunngjørt verður at okkara kæri maður, pápi, sonur og beiggi

**Jens Pauli Poulsen**
Tvøroyri

andaðist 4. oktober, 51 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju tórsdagin 9. oktober kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Súsanna**

Tey, ið vilja minnast Jens Paula kunnu læta eina peningagávu á konto í Føroya Sparikassa 9181/139.885.9.

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Thorstein Arge**
Tórshavn

andaðist í heiminum 5. oktober, 64 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 8. oktober kl. 14.00

*Familjunnar vegna*
**Marin**



# Sinnisveik fram í ljósið

**Tabu skulu brótast, allar oyggjar skulu fáast við og vitanin skal økjast. Málið er at fáa bestu psykiatriina í Norðurlondum. Nýggja forkvinnan í Sinnisbata leggur hart út, og fríggjadagin gongur hon á odda fyri mótmælisgongu fyri sinnisveik í Føroyum**

SINNISSTERK
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Soffi Egholm er væl ílætin til ruskveður. Hon ætlar at ruskað í føroyingar, so sinnisveik koma fram í ljósið og gerast náttúrligur partur av Føroyum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bestu psykiatri í Norðurlondum.

Einki minni hevur nýggja forkvinnan í Sinnisbata, Soffi Egholm, sett sær sum mál, nú hon hevur lagt í vaði og ætlar at ruska føroyingar, so tey sinnisveiku verða tikin í álvara.

– Sjálvandi skulu vit stíla eftir tí optimala. Og tað ber til, at Føroyar verða eitt undangonguland. Føroyar eru lítlar, og vit hava eitt væl útbygt samskifti. Fólk hava góða vitan yvirhøvur, men tað haltar álvarsliga við psykiatriini, tí hon enn er tabu. Tað er hetta, vit skulu bróta niður og byggja upp við einum felags stríði, sigur Soffi Egholm.

Hóast hon hevur sett sær stór mál, so er støðan hjá sinnisveikum í Føroyum alt annað enn góð, sigur hon. Hon skuldi vitað, hvat hon tosar um, tí hon er sjálv psykoterapeut við sergrein í psykiatri, og í heili 26 ár hevur hon starvast innan psykiatri í Danmark.

Nú er hon flutt aftur til Føroya. Henni dámar veðurlagið, har alt stendur í einum ein dag, og tað er logn næstu løtuna. Tað er náttúrukreftir, henni dámar, og sum í yvirførdum týdningi mugu til, um skil skal fáast á viðurskiftunum hjá sinnisveikum.

– Eg var til ein fyrilestur hjá Sinnisbata, har eg fyrst gjørdist eykalimur. Eg varð skelkað um, hvussu illa tað stendur til í Føroyum, og tí fekk eg hug at taka eitt tak. Onkursvegna mugu vit fáa skipað økið, fáa tað formaliserað, tí tað eru alt ov fáar handlingar politiskt. Men í staðin fyri bara at rópa eftir politikarum, so mugu vit byggja upp, so vit fáa allar kreftir við, sigur Soffi Egholm.

## Vitanin skortar

Góður vilji skal til, viðgongur hon, men fyrst og fremst er tað vitanin, sum er so alneyðug, og henni skal tað ikki skorta á. Restina av árinum hevur hon sett av til at skapa neyðug sambond kring oyggjarnar. Hon hevur flutt aðalfundin hjá Sinnisbata til januar, so felagið fær arbeitt við hesari verkætlanini burturav til ta tíð.

– Hetta verður ein áheitan á alt landið. Vit hava nakrar oyggjar, sum fullkomiliga eru uttanfyri, tá tað kemur til psykiatri, og tað er heilt galið. Har finnast nógvar kreftir, sum kunnu í brúkast í hesum felagsskapi, sum kann geva sinnisveikum betri sømdir. Vit mugu standa saman, og tað má ikki verða soleiðis, at tað bara eru brúkarar í hesum felagsskapi men ein felags fatan millum fólk yvirhøvur, sigur hon.

Tabu er størsta forðingin, og tað fer hon at gera nakað við sum tað fyrsta. Allir skúlar skulu kunnast, og tað hevur stóran týdning at fáa Pedagogskúlan við, tí pedagogar eru góðar at fáast við menniskju. Politikarar og arbeiðsmarknaðurin má eisini fáast við, tí tað ræður um at veita hjálp til sjálvhjálp.

## Goymd og gloymd

Soffi Egholm heldur, at tey sinnisveiku í Føroyum tíðliga duttu burturímillum í samfelagnum og vórðu goymd og gloymd.

Eini 40 til 50 fólk hava verið innløgd í áravís. Tað byrjaði, tá tey komu heim úr viðgerð í Danmark í 70-árunum, og vórðu parkerað í sjúkrahúsverkinum, sum gjørdist teirra bústaður.

– Tað er ein skammblettur, sum setir spurningin, um sinnisveik í Føroyum hava grundleggjandi mannarættindi, sigur Soffi Egholm.

## Skjót er góð hjálp

Tað týdningarmesta er, at sinnisveik tíðliga fáa hjálp. Tað er ikki støðan í Føroyum, heldur forkvinnan í Sinnisbata.

– Hetta eru fólk í djúpari kreppu, sum gerast verri at lekja, um tey bíða ov leingi. Og tað er eisini dýrari fyri samfelagið í longdini, tí tað er dýrari, at fólk bíða og gerast verri, enn at tey fáa viðgerð skjótt, sigur Soffi Egholm.

Alt byrjar við, at fólk fáa óttan fyri sálarveikum burtur og skilja, at tað er ein sjúka, sum kann henda øllum. Nú skulu tey sálarsjúku burtur úr gloymskuni og fram í ljósið, og tað fæst sjón fyri søgn fyri, tá mótmælisgongan verður oman á Vaglið fríggjadagin.

# Mótmælisgonga fyri sálarveik

**Fyri fyrstu ferð verður altjóða sinnisdagur hildin í Føroyum. Í sambandi við dagin verður eisini skipað fyri mótmælisgongu, har gjørt verður vart við støðuna hjá sinnisveikum**

SINNISDAGUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Meira tolsemi og betri fatan av teimum sinnislíðandi og teirra kæru. At skapa betri bústaðar-, ítrivs- og verkamøguleikar. At fyribyrgja sálarsjúkum. Og at fáa føroyingar at styðja arbeiðið fyri sinnisveikum.

Hetta er endamálið við Sinnisdegnum í Føroyum. Dagurin verður hildin fríggjadagin í sambandi við, at alheimsheilsustovnurin hjá Sameindu tjóðum, WHO, hevur kosið 10. oktober at vera sálarheilsudag.

Hetta er fyrstu ferð, at dagurin verður hildin í Føroyum, men hann hevur verið hildin í øðrum londum í tíggju ár. Felagið Sinnisbati nýtir høvið at varpa ljós á støðu teirra sálarsjúku í Føroyum og skipar fyri tiltaki við heitinum »Gevið sinninum gætur«.

– Vit í Sinnibata hava valt at leggja dent á hetta evnið og á støðu teirra sálarsjúku í Føroyum sum heild. Øll kunnu vera rakt av sálarveikleikum og sálarsjúku, summi tíðliga og onnur seinni í lívinum. Tí eiga vit øll, bæði ung og fólk í bestu árum, at hava hugtakið »eitt sunt sinni« frammarlaga í huga hvønn dag og hugsa um tey, sum eru rakt av hesi sjúku og teirra kæru, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata.

Í sambandi við Sinnisdagin verður kravgonga. Hon fer úr Norðurlandahúsinum kl. 14.30. Gingið verður oman á Vaglið, har forkvinnan í Sinnisbata og sálarlæknin Tórmóður Stórá halda røður. Aftaná verður opið hús við pallborðsfundi og drekkamunni í Platformi, har Jóhan í Kollafirði hugleiðir um støðu teirra sálarsjúku.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## Telduskeið fyri nýbyrjaran í Havn og í Eysturoynni

Skeiðstovan KVASIR bjóðar tær nú at koma á skeiðrøðina "Lær at nýta" í heystfrítíðini. Talan er um skeið á byrjunarstøðið. Eingin krøv til forkunnleika eru – vit byrja frá grundini.

**Skeið í Eysturoynni:**
Vegna stóran eftirspurning fara vit nú eisini at bjóða hesi somu skeið í Eysturoynni – somu tíðir, sum tey verða hildin hjá KVASIR í Tórshavn. Skeiðini í Eysturoynni verða hildin í Runavíkar Skúla.

**SKEIÐ UM DAGIN**

**13/10** mánadag: **Lær at nýta teldu** kl. 09:00-16:00
**14/10** týsdag: **Lær at nýta tekstviðgerð** kl. 09:00-16:00
**15/10** mikudag: **Lær at nýta internet** kl. 09:00-16:00
**16/10** hósdag: **Lær at nýta rokniark** *(bert í Tórshavn)* kl. 09:00-16:00

**SKEIÐ UM KVØLDI**

**13/10** Mán, týs, mik: **Lær at nýta teldu** kl. 19:00-22:00:

Kostnaður fyri hvørt skeiðið er kr. 1.985. Um tú teknar teg til tvey skeið, veita vit 10% í avsláttri. Um tú teknar teg til trý skeið, veita vit 20% í avsláttri. Íroknað í skeiðkostnaðin er skeiðtilfar, leskidrykkir, the, kaffi og ábit.

Tekning fer fram við at ringja á tlf 320 204. Vit svara eisini leygardag kl. 9-16.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
TLF 320204
www.kvasir.fo